## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu,
tá góða mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

**Sunneva Johannesen**
Klaksvík

andaðist og varð jarðað
Tøkk til Norðoya Røktarheim fyri røkt
og umsorgan, meðan hon var har.
Tøkk fyri heilsanir, blómur og kransar.
Tøkk fyri góða hjálp til jarðarferðina.
Hjartans tøkk til tykkum øll,
sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Kærar heilsanir*
**Jóannes og Edith v/ fam**
**Rannvá og Árni v/ fam**
**Jóna, Katrin og John v/ fam**

## Tøkk

Vit takka fyri sýnda samkenslu, tá kæra mamma,
vermóðir, omma og langomma okkara

**Elin Maria (Ellemia) Gregersen**

andaðist og varð jarðað.
Takk tit øll, sum stuðlaðu undir sjúkraleguni
og gjørdu tíðina lættari hjá mammu.
Takk til lækna, heimarøktina og starvsfólkið á B6
á Landssjúkrahúsinum.
Takk fyri góða vegleiðing og dyggan stuðul
gjøgnum sjúkraleguna.
Takk til bisp, talarar, spælarar, sangarar, kirkjutænarar
og tykkum øll, sum hjálptu til við ervinum.
Takk fyri blómur og kransar.
Takk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara
seinasta hvíldarstað.

*Vegna familjuna*
**Sæunn, Dagbjørt, Elin, Hallbera, Malan og Ólavur**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá elskaði
maður, pápi, verðfaðir, abbi og beiggi okkara,

**Tórbjørn Mikkelsen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.
Vit takka Bjarna Bæk fyri vælvald og troystarrík orð.
Tøkk til sangarar og Oddvør Johansen
fyri vakurt urguspæl.
Tøkk fyri telefonsamrøður, vitjanir, blómur, kransar
og gávur til Krabbameinsfelagið.
Hjartans tøkk fyri alla hjálp í sambandi við
jarðarferð og ervi, og tøkk, øll tit, sum fylgdu
honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Eyðbjørg**
**Brynhild og Regin**

# Ein kærleiksjáttan til Skálavík



*Klokkan 13.23 tann 26. juni 2008 varð spakin settur*

Hóast veðrið ikki var av tí allar besta var nógv fólk savnað inni í Grind í Skálavík, hósdagin 26.juni. Bygdarsonurin, Ejler Jacobsen, hevði sett fólkinum stevnu, saman við bygdaráðsformanninum, Linjohn Christiansen, í samband við, at ein stór verkætlan varð sett í gongd hendan dagin.

Allir borgarstjórarnir á oynni høvdu eisini leita sær til Skálavíkar fyri at vera við til hesa merkisløtuna. Verkætlanin eitur Immanuel, sum merkir “Gud við okkum.”

Nakað av fólki var komið við Teistanum til hetta høvi, og tá vit komu til Skálavíkar, um miðdagsleitið, stóð borðreitt fyri okkum í Kelduni við føroyskum viðskera. Kl. 13.00 varð farið inn í Grind, har ein nýgjørdur haki stóð, sum skuldi nýtast til at grava fyrsta bøkkin upp, sum startskotið til hesa stóru verkætlan, har nógv tons av mold skal flytast áðrenn farið verður undir sjálva bygginginga. Ein gravimaskina og ein lastbilur vóru parkeraði á staðnum, so gestirnir kundu standa í lívd meðni sungið varð og borgarstjórin og Ejler bóru hvør sína heilsan fram.

### Spakin settur í

Tað var Ejler sjálvur, sum tók tað fyrsta hakastykkið klokkan 13:23 - har lá so tann fyrsti bøkkurin á bønum og eitt bøkkeyga í mógvinum, sum ein vitnisburður um, at her verður av sonnum loyst úr lagdi.

Hvar Ejler sjálvur ynskir at ankra hetta byggiverk kom greitt fram, tá hann, beint áðrenn fyrsta hakabøkkin, læs í Sálmi 127: “Byggir ikki Harrin húsið, so arbeiða teir til ónyttu, sum byggja at tí; varðar ikki Harrin staðin, so vakir vaktarin til ónyttu.” Ejler hevur valt at kalla byggingina við navninum Immanuel, sum ein vitnisburð um, at verkætlanin einans kann eydnast nøktandi, um Gud vil og er við í verkinum.

Meðni Ejler stóð við hakanum í hondini og beint áðrenn hann setti hakan í, fortaldi hann fólkinum, at tá hann var 14 ára gamal var hann við til at gera ein fótbóltsvøll og ein veg í bygdini. Tímalønin var eina krónu, og spakin, sum hann sjálvur var noyddur at keypa, kostaði 8 krónur.

### Depil til fleiri endamál

Verkætlanin fevnir um økið inni á Grind, sum er 50.000 fermetur til støddar. Depilin sjálvur verður 4000 fermetur. Talan er um ein frítíðar- og fundardepil. Ejler leggur stóran dent á, at depilin eisini er ein fundardepil, tí, sum hann sjálvur sigur, at depilin skal eisini vera opin fyri kristnum virksemi sum møtir, møtiróðir, skeiðir, stevnir og legur av ymiskum slag.

### Ikki annað Zarepta

Hetta verður tó ikki eitt nýtt Zarepta ella eitt nýtt Nesvík, men ein samanseting av handilsligum og andaligum virksemi, soleiðis at skilja, at depilin verður gjørdur sum ein nútíðar mentanardepil har ynskjandi er, at grundarlag verður lagt fyri eini breiðari viftu av frítíðar- mentanar- og kristiligum virksemi, við allari útgerð, sum ein slíkur depil krevur í dag: Svimjihøll, ítrivs- og motiónshølir, ítróttarhøll, fótbóltsvøllur, spæliøkir til børn, størri og minni fundar- og konferensuhølir, fyrilestrarhølir, café- og restauratiónshølir, tónleikahøll og eisini verða yvir 70 nýmótans hotelkømur.

Borgarstjórin segði í síni røðu, at við teimum 50.000 fermetrunum, so verður eisini møguleiki fyri camping á staðnum, og eisini skiltu vit á borgarstjóranum, at hesin nýggi depilin eisini skal vera eitt familju- og barnavinarligt stað. Eisini róð hann í røðu síni uppundir, at ítróttarfólk og – feløg, bæði heima og uttanlanda, koma at nýta depilin sum venjingar- og ítróttarskúla.

### Altjóða dám

Depilin kemur at hava altjóða dám, tí ætlanin er, at fáa altjóða konferensur/ráðstevnur at fáa eyguni upp fyri, at Føroyar eru eitt serstakt stað til altjóða virksemi, og við hesum nýggja depilinum í Skálavík nýtist Føroyum ikki at smæða seg burtur at bjóða seg fram sum karmur um alt slag av altjóða fundar- og skeiðvirksemi.

Verkætlanin er fyrsta av sínum slag í Føroyum, tí her á landi eiga vit enn ikki ein veruligan stevnumiðdepil. Norðurlandahúsið og hotellir hava verið brúkt til tílíkt, men tað er tó avmarkað hvat tey kunnu bjóðað, tá sammett verður við ein altjóða savningardepil.

### Umhvørvisvinarligir

Depilin verður umhvørvisvinarligur við tað, at ætlanin er ikki einans at nýta olju, men eisini at nýta sól- og vindorku og eisini jørðhita. Eisini her er verkætlanin nýskapandi, og hugsandi er, at hon við hesum kemur at rudda slóð fyri veruligum íløgum í alternativari orku her á landi.

### Dagligur leiðari

Verkætlanin liggur sjálvsagt í tíggjutalsmilliónaklassanum, og tá Ejler varð spurdur av útvarpskvinnuni um fígging, svaraði hann, at “hetta verður fíggjað úr egnum lumma.” Tað er ein sjálvsognarstovnur, sum eigur depilin og kemur at dríva hann á vanligum handilsligum støði. Ejler sigur, at táið depilin er liðugur og klárur at taka í brúk, verður ein dagligur leiðari settur burturav, sum tey ikki enn vita hvør er, men vónandi verður tað tann rætti persónurin, sum bæði hevur hegni og visjónir fyri slíkum arbeiði. Sonurin, Petur, leiðir verkætlanina meðni byggingin fer fram.

Tá liðugt var inni í Grind, vóru øll boðin oman í bygdarhúsið Kelduna, har borðreitt var við feskari súpan. Har var høvið at bera fram heilsanir og góð ynskir:

- “Tað er gott, at onkur er, sum ikki goymir gullið, men letur tað koma fólkinum og samfelagnum til góðar, sum hendan verkætlanin er eitt gott dømi um.”

- “Hetta er ein kærleikserklering til heimbygdina Skálavík!”

Ein beit merki í, at borgarstjórin tók soleiðis til, at lendi undir eini slíkari verkætlan, má á ongan hátt verða ein forðan. Tað er ikki altíð, at menn møta slíkari jaligheit frá almennari síðu, tá teir hava eitthvørt á hjarta. Hetta er at gleðast yvir, og lat okkum vóna, at verkætlanin, frá byrjan til endan, fær vælvild frá almennu myndugleikunum og frá bygda- og oyggjafólkinum, soleiðis, at hendan verkætlanin, saman við undirsjóartunlinum, verður við til at gera Sandoynna til ein ósvitandi part av føroyska miðstaðarøkinum.

Poul Jóhan Djurhuus,
Gjaranes@post.olivant.fo

## FAKTA

ARKITEKTUR: Selmar Nielsen, Tórshavn.
GREVSTUR: Finnleif Fagradal, Sandur
SMÍÐIARBEIÐ: Reynhold Nilsen, Tvøroyri.
PROJEKTLEIÐARI: Petur Jacobsen (sonur Ejler)
LENDI: 50.000 fermetur
DEPIL: 4000 fermetur
LIÐUGT: 1 ½ - 2 ár
ORKA: Vanligt kolvetni, sól- og vindorka og jørðhiti.
FÍGGING: Eginfígging

